

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 04 - 2012

# Ongar samráðingar um oljuna í Norðsjónum

-Vit samráðast ikki um at endurskoða avtaluna um oljuna í Norðsjónum, og samstarvið millum partarnar kann bara eydnast væl, um partarnir hava álit á hvør ørðum. So greiður var nevndarformaðurin í A.P. Møller - Mærsk, Michael Pram Rasmussen, í ársfrágreiðingini á aðalfundi felagsins í morgun. Hann segði, at tað almenna orðaskiftið kundi givið fólki ta fatan, at partarnir samráðast um at endurskoða avtaluna, men so er ikki. Mærsk-formaðurin legði afturat, at verandi avtala bleiv gjørd fyri at tryggja statinum ein størri part av avlopinum, bæði tá oljuprísurin er lágur, og tá hann er høgur. Hann vísti í hesum viðfangi á, at Mærsk hevur gjørt íløgur fyri meiri enn 30 milliardir krónur í Norðsjónum, síðani verandi avrala varð undirskrivað. -Oljuprísurin er hækkaður síðani 2003. Prísurin verður eisini skiftandi í framtíðini. Tað vistu partarnir, og tí varð dentur lagdur á at tryggja statinum ein størri part av avlopinum, bæði tá oljan er dýr, og tá hon er bílig, segði Michael Pram Rasmussen. Og hann helt fram - -Við avtaluni vaks parturin hjá statinum upp í 60 prosent, og við tí høga oljuprísinum í seinastuni hevur parturin hjá statinum verið tveir triðingar. So sjálvt um tað eru vit, sum taka váðan á okkum, tekur staturin tvær av hvørjum trimum krónum. Undir kjakinum um at endurskoða avtaluna um oljuna í Norðsjónum hava summi víst á viðurskiftini í Noregi, men formaðurin í Mærsk sigur, at hendan samanberingin er skeiv. Hann segði, at í Noregi hevur munandi fleiri og størri oljuleiðir, og tað økir um íløguhugin, hóast skatturin er høgur.

